# Stuttan steðg

**Týsku landsliðsleikararnir ætla ikki at vera í Føroyum longri enn hægst neyðugt**

DYSTUR
*Heri á Rógvi*

Besta týska landsliðið í fótbólti skal spæla á Tórsvøll mikudagin hin 11. juni. Men týsku leikararnir ætla ikki at steðga longri enn í Føroyum enn hægst neyðugt.

Ìsak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF, upplýsir, týsku leikararnir koma til Føroya úr Skotlandi, har liðið leygardagin hin 7. juni skal spæla móti Skotlandi.

Týskararnir fara at venja týskvøldið kl. 18 á Tórsvølli, har øll kunnu koma at hyggja, sum hava hug.

Mikudagin verður eitt stutt venjing fyri at gera leikararnar klárar til dystin mikukvøldið. Ísak Mikladal sigur, at týska landsliðið vil sleppa avstað longu sama kvøld, men tað er ikki vist, um hetta ber til. Annars fara týsku stjørnurnar avstað hósmorgunin 12. juni.




*Dysturin millum Føroyar og Týskland á Tórsvølli er størsti fongurin hjá FSF, síðani farið varð upp í altjóða fótbólt, og hetta sæst eisini aftur á atgongumerkjaprísunum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Føroyar v Týskland:

# Prísurin og áhugin í topp

**7. apríl byrjar atgongumerkjasølan til landsdystin millum Føroyar og Týskland á Tórsvøll. Atgongumerki kunnu bíleggjast, og kostnaðurin fyri vaksin verður 250 kr. í forsølu**

DYSTUR
*Heri á Rógvi*

11. juni umleið klokkan sjey á kvøldi hittast A-landsliðini hjá Týsklandi og Føroyum á Tórsvølli.

Hetta er helst størsta ítróttahending í Føroyum, og áhugin er longu stórur. Hetta er kanska eisini orsøkin til, at prísurin fyri atgongumerki eisini røkkur nýggjar hæddir.

Ert tú seytjan ár ella eldir, skalt tú gjalda 250 kr. fyri eitt atgongumerki til dystin í forsølu. Tey, ið eru sekstan ár og yngri, sleppa inn fyri hundrað krónur.

Hetta er væl meira, enn vanligi kostnaðurin hevur verið seinastu árini, men tá hevur tað heldur ikki verið Týskland, sum hevur vitjað. 7. apríl byrjar forsølan til dystin. Eisini her eru broytingar gjørdar í mun til undanfarnu dystir. Til ber ikki longur bara at fara á posthúsið at keypa sær eitt atgongumerki. Til dystin móti Týsklandi kunnu atgongumerkini bíleggjast frá FSF.

Ísak Mikladal upplýsir, at frá 3. apríl at rokna verður gjørligt at heinta bíleggingarskjal av heimasíðuni hjá FSF. Forsølan heldur fram til 5. mai. Verður útselt verður sjálvandi steðgað áðrenn.

Bíleggingar verða bert góðtiknar, um tær verða sendar beinleiðis til FSF og upplýst verður navn og bústað á hvørjum persóni fyri hvørt atgongumerki.

– So hvørt sum bíleggingar verða góðkendar, fær bíleggjarin fráboðan um hetta, við upplýsing um plássini og við áheitan um at rinda fyri atgongumerkini, ein freist verður sett fyri nær rindast skal, um ikki verður goldið til tíðina, verða atgongumerkini seld øðrum.

Tey, sum hava rinda fyri atgongumerkini, fáa hesi sendandi 10 dagar áðrenn dystin, sigur Ísak Mikladal. Til ber at biðja um ávís pláss, men tað er ikki vist, at alt letur seg gera.

**4650**

Tórsvøllur hevur í alt eini 6.000 setur. Vitjandi liðið fær 10% av atgongumerkjunum at selja til sínar áskoðarar, t.e. 600 áskoðarar.

Ísak Mikladal sigur, at hesi atgongumerki langt síðani eru seld. Fótbóltssambandið vil hava upplýst frá týska fótbóltssambandinum, DFB, navni á hvørjum áskoðara, og ferðingin til og úr Føroyum skal upplýsast, og innivist í Føroyum skal kunna ávísast.

– Vit gera hesi átøk fyri betri at kunna stýra gongdini, soleiðis at tað ikki koma ov nógv fólk, sum ongastaðni hava at vera, sigur Ísak Mikladal.

Afturat teimum sekshundrað atgongumerkjunum til áskoðarar fær DFB 150 atgongumerki til sínar stuðlar.

Týskararnir fara eftir ætlan at sita við húsið á langsíðuni vestureftir, soleiðis at týskarar fara at fylla tað mesta av hesi síðuni.

FSF fer væntandi at nýta 600 atgongumerki til sínar stuðlar v.m., og hetta merkir, at 4.650 atgongumerki verða seld almenninginum, sigur Ìsak Mikladal.

**Vinningur**

Dysturin móti næst besta landsliðnum í heiminum fer væntandi at kasta heilt fitt av peningi av til Fótbóltssambandið.

– Vit rokna við, at tað verður útselt til dystin. Àbendingar siga okkum, at áhugin er stórur. Vanliga plagar luttaka í undankappingum at geva hall, men nú hava vit møguleikan at gjalda okkurt skuld aftur, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandi Føroya.

Hann sigur, at hetta er besta lutakastið hjá føroyska landsliðnum, síðani farið varð upp í altjóða kappingar fyri skjótt fimtan árum síðani.

– Tað gongur ikki, at vit skulu bíða fimtan ár afturat, sigur Ísak Mikladal.

**Fakta**

Kostnaðurin fyri atgongumerki er:

**Forsøla:**

| | |
|---|---|
| Børn 0 - 16 ár | kr. 100,00 |
| Vaksin 17 ár og eldri | kr. 250.00 |

**Við inngongdina:**

| | |
|---|---|
| Børn 0-16 ár | kr. 140,00 |
| Vaksin 17 ár og eldri | kr. 300,00 |

Atongumerkini verða seld í forsølu frá mánadegnum 7. apríl. Almenningurin hevur møguleika at keypa 4.650 atgongumerki.

Bíleggjast skal við navni og bústaði á hvørjum einstøkum persóni, ið ynskir at ogna sær atgongumerki

# Umskipan á Tórsvølli

Til dystin móti Týsklandi sleppa fólk ikki longur at ganga á asfaltinum rundanum vøllin.

Fólk skulu í framtíðini venja seg við, at hvør tribuna hevur sína inngongd.

Tórsvøllur hevur fingið játtað pening frá Tórshavnar kommunu til at gera hetta arbeiðið, og samstundis verða eisini nøkur nýggj WC sett upp til hvørja tribunu.

– Hetta hevur verið meiningin alla tíðinia, men vit hava ikki havt pengarnar fyrr enn nú, sigur Poul Michelsen, formaður í grunninum fyri Tórsvøll.



# Landsstýrismaður fekk mateitran

**Tá umboð fyri Strandferðsluna og Føroya Landsstýri høvdu verið úti og etið døgurða saman við teimum á skipasmiðjuni í Spania, gjørdust fleiri av teimum sjúk. Gitt verður, at talan er um salmonella-eitran**

MAT-EITRAN
*Solby A. Eliasen*

Av fimm føroyingum gjørdust fýra sjúkir eftir at hava etið døgurða aftaná, at kjølurin var strektur. Ein av teimum, sum bleiv rættiliga illa fyri, var landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm.

– Eg havi ikki verið so sjúkur í lívinum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnu og samferðslumálum, tá Sosialurin fær fatur á honum hansara fyrsta arbeiðsdag, síðani hann kom heimaftur hósdagin.



*Bjarni Djurholm var ein av teimum, sum bleiv rættiliga sjúkur eftir ein døgurða í samband við, at kjølurin á nýggja suðuroyarskipinum varð strektur*

Hann greiðir frá, at tá alt við kjølinum á nýggja suðuroyarskipinum var liðugt og teir fundir, sum skuldi verða, høvdu verið, fóru fólk út at eta. Tað var ein púra vanligur døgurði, har onkur bílegði sær fisk, meðan onnur heldur vildu eta kjøt. Sjálvur át landsstýrismaðurin kjøt. Forrætturin var skeljadjór, og omaná fingu tey okkurt slag av køku, og tað er møguliga har, tey hava fingið eitranina frá, heldur Bjarni Djurholm, men hann veit tað ikki fyri vissu. Hann kennir ikki smálutirnar í sambandi við hetta, men hann veit, at Strandferðslan fer at ella hevur gjørt vart við, at fólk gjørdust sjúk av matinum hetta kvøldið.

– Tað vóru møguliga rá egg í køkunum, sum tey fingu omaná, sigur hann. Í øllum førum gjørdust øll sjúk, sum høvdu etið av teimum.

Um náttina vaknaði hann og var heilt illa fyri. Magin var púra oyðilagdur, og hann hevði fepur. Tá hann fór heim við flúgvaranum dagin eftir var støðan framvegis líka ring. Hann hevði yvir 39 í fepuri og var illa fyri. Tað var alt annað enn stuttligt hjá honum at noyðast at sita í flúgvara og vera so sjúkur. Heimkomin, fór hann beint í songina at liggja og varð liggjandi í fleiri dagar. Týsdagin var støðan so mikið batna, at hann kundi fara aftur til arbeiðis – nærum eina viku eftir døgurðan.

Strandferðslan ger vart við, at fólk gjørdust sjúk eftir døgurðan, og hvat síðani hendir, veit Bjarni Djurholm ikki at siga. Hann veit tó, at tað ikki bert vóru føroyingarnir, sum gjørdust sjúkir.

– Nøkur frá skipasmiðjuni hava eisini ligið hesa vikuna, sigur hann.

Tað var bert tann eini føroyingur, sum slapp við skrekkinum og ikki bleiv sjúkur.

# Kjølurin á nýggja suðuroyarskipinum strektur

**Mikudagin í seinastu viku varð kjølurin til nýggja suðuroyarskipið strektur á skipasmiðjuni í Spania**

SKIPASMÍÐ
*Solby A. Eliasen*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, var tilstaðar, tá kjølurin á nýggja suðuroyarskipinum varð strektur mikudagin í seinastu viku*

Tvey umboð fyri Føroya Landsstýri og trý fyri Strandferðsluna vóru tilstaðar, tá kjølurin bleiv strektur mikudagin.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum var ein teirra, sum var har. Hann sigur, at tað var eitt ynski frá skipasmiðjuni, at umboð úr Føroyum vóru tilstaðar. Eftir at fyrsta sektiónin av kjølinum var strekt, var ein kunnandi fundur. Síðani var ein døgurði fyri teimum, sum vóru tilstaðar.

– Tað var fyri so vítt tað, sum gekk fyri seg harniðri, greiðir Bjarni Djurholm frá. Hann leggur afturat, at hetta var ein blandingur av einum arbeiðstúri og einum túri til strekkingina av kjølinum. Tí Strandferðslan og fyritøkan Knud Hansen, sum hevur projekteringina av nýggja suðuroyarskipinum, nýttu høvi til at hava nakrar fundir eisini, har tey fingu ymisk viðurskifti upp á pláss aftur.

Leiðin gekk heimaftur longu dagin eftir.

# Freedom aftur til Føroyar

**DJ Freedom kemur nú aftur til Føroya. Komandi vikuskiftið fer hann at hava tvær konsertir. Eina í Klaksvíkar Klubba og eina í mentanarhúsinum í Fuglafirði**

KONSERT
*Solby A. Eliasen*




*DJ Freedom verður aftur í Føroyum komandi vikuskiftið. Fríggjakvøldið í Klaksvík og leygarkvøldið í Fuglafirði*

DJ Freedom verður nú aftur at síggja í Føroyum. Hann kemur til Føroyar at hava tvær konsertir komandi vikuskiftið. Tað er Havgrímur Johannesen og Platform, sum hava heitt á hann at koma aftur hendanvegin. Hann var herheima í fjør. Tá var hann í TB húsinum og í Platform. Báðar konsertirnar tá vóru útseldar, og fólk lótu væl at. Men havnafólk verða tó ikki heilt snýtt fyri Freedom hesuferð. Hann kemur uppaftur til Føroya um einar tvær ella tríggjar vikur, og tá fer hann at hava tvær konsertir í Platform.

Freedom kemur til Føroya í kjalarvørrinum at sínari fyrstu fløguútgávu, sum hevur fingið heitið Hang On. Hann hevur júst lagt ta seinastu hondina á útgávuna, sum uttan iva hevur fleiri góð hitt, sum fara at dundra út úr hátalarum í flestu diskotekunum í ríkinum.

Hang On var somuleiðis tað fyrsta hittið, sum hann kom fram við. Hann hoyrdi henda sangin fyrstu ferð í einum lítlum býi, har hann var DJ, og hann hoyrdi beinanvegin, at her var ein sangur, sum kundu verða eitt stórt hitt, um ein gjørdi okkurt við hann fyri at poppa hann upp eitt sindur. Og rætt fekk hann, tí Hang On reyk beinleiðis upp á toppin á danska dans-chart listanum og varð liggjandi har í heilar 21 vikur. Síðani gav hann eitt annað lag út, sum eitur Susanna, og tað fekk líka so góða móttøku, og var atkvøtt beinleiðis inn á eitt 10. pláss á danska dans-chart listanum, sum DJ-arar í Danmark atkvøða til.

Sum sagt, so verður Freedom at síggja í Klaksvíkar Klubba fríggjakvøldið og í mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið. Atgongumerki fáast við dyrnar, sum verða opnar frá klokkan 23 til 04.